# Semja

Semja millum:

**Kost og føðslufelagið**

**og**

**Fíggjarmálaráðið**

Kost og føðslufelagið og Fíggjarmálaráðið eru vorðin samd um at gera hesar broytingar í sáttmálan, ið var galdandi til 1. oktober 2020.

**Sáttmálaskeið og lønarhækkanir:**

Verandi sáttmáli verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2020 til 1. oktober 2024.

- Tann 1. januar 2021 hækka mánaðarlønirnar 2,05 %.
- Tann 1. oktober 2021 hækka mánaðarlønirnar 1,25 % og samstundis verður fari yvir til nýggja lønartalvu, sum greiðari vísir ymisku starvsbólkarnar.
- Tann 1. oktober 2022 vera hesar broytingar galdandi:

  Lønirnar á stig 19 til og við stig 33 hækka við 690 krónum, og lønirnar omanfyri stig 33 við 490 krónum.

  Umframt hetta hækkar endalønin hjá føðsluatstøðingum og føðslutøkningum við 500 kr. um mánaðin og hjá føðsluhjálparum við 750 kr. um mánaðin. Endalønin hjá BA í føðslu og heilsu / Kliniskur diætistum verður frá umrødda degi 35.320,87 kr. um mánaðin.

  Eftirlønargjaldið lækkar úr 15,8 % niður í 15%.

  Leiðarar 1 og 2:

  - Lønin hjá Leiðari 1 hækkar kr. 1.150,- umframt vanliga lønarhækkan
  - Lønin hjá Leiðari 2 hækkar kr. 1.300,- umframt vanliga lønarhækkan

- Tann 1. oktober 2023 hækka mánaðarlønirnar 2,75 %.

BA í føðslu og heilsu / Kliniskur diætistur, sum undirvísa á Heilsuskúlanum, skulu flokkast á endastigi, umframt eina viðbót áljóðandi kr. 922,- galdandi frá 1. okt. 2021. Afturat hesi flokking, skulu tey hava eina viðbót – um tey hava ella tá ið tey hava fingið pedagogikum- á kr. 2.591,-. Endamálið við ásetingini er at javnstilla allar undirvísarar á Heilsuskúla Føroya við líknandi útbúgving.

Nýggju lønartalvurnar eru broyttar so lønargongdin hjá hvørjum útbúgvingarbólki er greitt markað og stigatali verður broytt til at fylgja útbúgvingarbólkinum (t.d. Føðsluhjálpari, 3 stig: 1-3, Føðsluatstøðingur, 5 stig: 1-5).

**Broytingar í sáttmálatekstinum**

Fleiri ásetingar eru dagførdar og broyttar í sáttmálanum og sáttmálateksturin er dagførdur.

**§ 29 Gildi og uppsøgn**

Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2020.
*Stk. 2.* Báðir partar hava rætt at siga sáttmálan upp at fara úr gildi við 3 mánaða ávaring, tó í fyrsta lagi tann 1. oktober í 2024. Tá ið uppsøgnin av sáttmálanum fær gildi, og til nýggjur sáttmáli tekur við, verða kost- og føðslustarvsfólk fyribils lønt eftir teirri avtalu, sum var í gildi síðsta dag, ið sáttmálin galt.

Tann 15. mars 2022

**Kost- og føðslufelagið**

*Thilda Gaardlykke*
*forkvinna*

*Gyða í Gongini*
*næstforkvinna*

**Fíggjarmálaráðið**

*Uni Rasmussen*
*landsstýrismaður*

*Jan Mortensen*
*lønarstjóri*